## Øll hjálpa til

Heilt frá allar fyrstu Ovastevnuni hevur tiltakið verið grundað á, at alt bygdarfólkið tók eina hond í. Har skulu setast básar upp. Har skal gerast klárt til dansikvøldini. Har skal skrá leggjast. Har skulu finnast álitisfólk til ymsu tiltøkini. Tjald skulu setast upp. Og ikki minst skal prýðast um í bygdini. Og tá Ovastevnan er vorðin so stór, sum hon er, er av allarstørsta týdningi, at øll hjálpa til. Her er lítli Petur farin at hjálpa pápa sínum at seta flaggstengur upp.



## Svimjing og scootarar

Leygardagin verður árliga svimjingin í sambandi við Ovastevnuna. Klokkan 16 verður lagt frá landi Yviri við Strond, sum vanligt. Í ár verður tó talan um tvær kappingar, tí svomið verður eisini 1000 metrar, har byrjað verður frá báti. Vinnandi svimjararnir frá ein flogferðaseðil frá Atlantsflog. Eisini verður fyri fyrstu ferð skipa fyri kapping um fjørðin við vatnscootara. Her letur Statoil gávubrøv til tríggjar teir fremstu, ávikavist 500, 300 og 200 krónur.

# A La Garagé



**Soleiðis er heitið á Ovastevnu-kabarettini, sum nólsoyingar fyri 15. ferð føra fram á palli – og so er støðið líkasum lagt**

OVASTEVNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Næstan líka gomul sum stevnan sjálv er Ovastevnu-kabarettin.

Fyrstu árini var mestsum bara talan um improvisión, og tá kundi tú fara til hvørja sýning og hvørja ferð uppliva nakað nýtt.

Men sum tíðin er liðin er eitt meiri professionelt snið komið yvir kabarettina.

Ikki tí, innihaldið hevur verið trúfast móti tankanum um, at leikararnir við góðs-innaðum speiðsemi gera gjøldur burtur úr teimum, sum hava gjørt okkurt minni heppið gjøgnum árið. Og soleiðis verður uttan iva eisini í ár.

Hóast leikararnir eru líka trúgvir móti traditiónini um einki at lata leka út framman undan, so góvu pallurin og onkur viltfarin orð korini onkra ábending.

Sum vant verður Ovastevnukabarettin spæld í Royndarhúsinum, og hesaferð kann henda, at eingir sangir verða við í kabarettini. Hetta kemst av, at trupult hevur verið at fingið tónleikarar at spæla undir, og serliga er tað ein vantandi trummuleikari, sum er trupulleikin.

Men hinvegin, kenna vit nólsoyingar rætt, so kunnu teir gera smá undur upp á onga tíð – eisini yrkja sangir til frumframførslu fáar tímar seinni.

### The Usual Suspects

Manningin er hesaferð sett saman av tveimum ógvuliga royndum leikarum, einum, sum var við í fjør, og so trimum debutantum.

Reidar Jacobsen er tann royndasti í kabaretthøpi í Nólsoy. Hann er við fyri 10. ferð av teimum 15 kabarettunum, sum hava verið leiktar á Ovastevnu.

Aksel á Botni (fyrr Joensen) er kortini uttan samanbering royndasti sjónleikarin við minst líka nógvum sjónleikum aftan fyri seg sum tær átta kabarettirnar, hann nú fer at hava leikt leikt. Hartil kemur, at hann hevur verið statistur í fleiri filmum.

Villy Joensen var eisini við í fjør, og hevur tí tær royndirnar at dúva upp á, meðan Vibeke á Botni hevur verið við í onkrum skúlaleiki.

Fyrstu ferð á palli eru Brandur Hansen og Jacoba Jacobsen. Hesi bæði hava tó systkin, sum hava drúgvar royndir sum kabarettleikarar. Snæbjørn Hansen telist millum drúgvastu kabarettleikarar í Nólsoy, meðan Nicolaj Falck (bróður Jacobu) hevur líknansi cv sum Aksel at vísa á.

Sum nevnt oman fyri fingust nøkur hint um, hvat kabarettin fer at snúgva seg um í ár. Onkrir avdúkandi figurar eru málaðir kulissirnar, og teir vísa, at í hvussu er nakrir av »the usual suspects« eru við.

Men eisini okkurt spildurnýtt offur fær eftir øllum at døma ein týðandi lut í kabarettini. Tað eru jú ikki øll, sum velja okkum ta traditionellu útbúgvingina.

*Leikararnir í A La Garage framman fyri garaguni: Aksel á Botni, Jacoba Jacobsen, Villy Joensen, Brandur Hansen, Reidar Jacobsen og Vibeke á Botni*

# Á pall at skora

**Eftir skemtinum at døma, tá Sosialurin vitjaði kabarettvenjingina í gjárkvøldið, so verður Ovastevnu-kabarettin góð – sum vanligt**

OVASTEVNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Lagið var gott, tá Sosialurin stakk inn á gólvið í Royndarhúsinum í Nólsoy, har Ovastevnukabarettin verður spæld. Manningin var í holt við at hanga projektørarnar upp undir loftið. Tað vil siga ein stóð í stiganum, ein annar helt honum, meðan hini fimm – ljósmaðurin íroknaður – hugdu at.

- *Ná, hvat fer kabarettin so at snúgva seg um í ár?*

- Nei, tað verður nøkurlunda tað sama, sum hini árini, er svarið.

- *Mest lokalt, kanska, nakað altjóða?*

- Okkurt politiskt, kanska. Nei, einki altjóða, men kanska tað verður skotið eitt sindur meiri eftir teimum yngru í ár.

- So mann er framvegis í vandabólkinum!

- Tað er grúvuligt, tú heldur teg vera ungan.

Soleiðis gongur samrøðan aftur og fram.

- *Ná, Jacoba, hví ert tú farin at spæla kabarett í ár, væntar tú, at tað verður lættari at fáa fatur á einum dreingi?*

Nú leggur Vibeke framat.

- Ja, hon fer á pall at skora.

Einki rínir við Jacobu, sum saman við Villy eru yngstu leikararnir í bólkinum. Tey skulu hava frumsýning kvøldið eftir, men kortini eru eingir nervar at spora.

Summir fáast enn við at rigga til. Forleingjarar mangla, so Brandur, ið hevur longstu beinini, verður sendur eftir nøkrum. Hann er skjótur aftur.

Mitt í tí heila kemur ein burturfluttur nólsoyingur stetlandi inn í høllina. Mundi helst halda, at stevnan longu var byrjað.

- *Eingin dansur?* Eg ætlaði mær inn at dansa, letur í honum.

- Nei, her var eingin dansur.

Ná, men her fæst einki meiri burtur úr kabarettfólkunum. Klokkan er eisini farin av tíggju, so frægast er at sleppa sær til hús. Tí, sum Valdemar tók til, í morgin er aftur ein dagur.



*Jacoba. Vibeke leggur hana undir at fara á pall fyri at skora...*
*Mynd: Leo Poulsen*